Tjóðveldi

**Uppskot til samtyktar um at byggja tjóðarhøll til innandura ítrótt og størri tiltøk**

Heitt verður á landsstýrið um beinanvegin at kalla kommunur og íleggjarar saman til at gera avtalu um at fíggja og byggja stórhøll, ið lýkur øll krøv til altjóða ítróttartiltøk og størri mentanartiltøk

## Viðmerkingar

Føroyar hava við eldsálum, víðskygni, áræði, neyvari venjingar og sjálvbodnum arbeiði í feløgum og sersambondum fingið einastandandi úrslit í ítrótti og mentan. Har skapt er ein menning, ið kanska fá høvdu ímyndað sær bar til.

Seinast hava bæði kvinnur og menn í hondbólti prógvað, at tað ber til hjá 53.000 fólkum í Norðuratlantshavi at spæla seg millum fremstu lond í heiminum við at seta sær stór mál og trúgva á egnan mátt, megi og samanhald.

Sum so ofta er hetta framt av undangongufólki undir kørgum fíggjarligum og materiellum umstøðum, har landspolitikkur haltar aftaná og vantar visjónir og atgerðarmegi.

Hóast kommunur og land seinastu árini hava gjørt stórar íløgur í nýggjar skúlar og hallir til ítrótt, eiga Føroyar onga høll, ið lýkur øll krøvini til landsdystir og altjóða ítróttakappingar og í fleiri av okkara fremstu innandura ítróttagreinum: Hondbólti, flogbólti, fimleiki, badminton, frælsum ítrótti og øðrum.

Tað er vantandi planlegging og samanhald, sum landspolitikarar eiga at taka ábyrgdina av bøta um beinanvegin.

Kommunur, ítróttafeløg og privatir íleggjarar hava umrøtt og tikið ymisk stig til tess at byggja stórhøll og multihøll til innandura ítrótt, ið lýkur øll altjóða krøv og eisini kann hýsa størri mentanartiltøkum, konsertum o.a.

Tað er at fegnast um, men landið má eisini taka ábyrgd av at menna eina veruliga tjóðarhøll, ið lýkur øll altjóða krøv og kann hýsa altjóða kappingum, sum Føroyar kunnu bjóða sær at hýsa.

Uppskot til eina multihøll er gjørt av privatum, har kostnaðarmetingin er millum 100 og 150 milliónir – alt eftir, hvussu nógv verður lagt afturat umstøðum og møguleikum fyri ymsu ítróttagreinunum, kringumstøðum og útgerð til mentanartiltøk.

Tíðin er langt síðani komin til, at Løgtingið og Landsstýrið taka ábyrgd og vísa, at vit trúgva tí, sum sjálvboðin og felagsskapir hava trúð og framt í so langa tíð.

Og at Føroyar sjálvsagt eiga at hava eina veruliga tjóðarhøll, ið lýkur øll altjóða krøv.

Hvar í landinum, hon verður bygd, er ikki avgerandi, men at hon verður bygd sum skjótast.

Tí halda vit í Tjóðveldi, at Løgtingið skal fáa landsstýrið beinanvegin at kalla inn kommunur og privatar íleggjarar til tess at gera eina avtalu um, at land, kommunur og privat í felag byggja og fíggja høllina.

Á løgtingi 23. August 2021

Vegna Tjóðveldi

Høgni Hoydal